# – Eg fari o

## Nesvík, Streymnes ella Sundhøvdi?

Í hesum døgum hoyra vit nógv um, at ein arbeiðir við at geva føroyskum bygdum gøtunøvn. Men tá ein einaferð fer undir hetta í økinum fram við Sundalagnum, er ikki vist, at tann uppgávan er so løtt.

Tann stóri spurningurin, sum ein kann seta sær eftir samrøðuna við Árna er nevniliga: Hvar býr hann - er tað í Nesvík, Streymnesi ella á Sundhøvda?

Árni sjálvur er ikki í iva um, at hann býr í Nesvík. Hetta heldur hann fast við, og tá hann skrivar undir onkustaðni, so er bústaðurin Nesvík - og ikki nøkur onnur bygd.

Hann hevur í sínum lívi sæð, hvussu hetta navnið var við at hvørva, men í dag er tað varðveitt og kann ikki tigast burtur. Og tað man hann vera fegnastur um.

- Hyggur ein landafrøðiliga eftir navninum, so liggur sjálv víkin - Nesvíkin - niðanfyri tað stóra leguhúsið, sum Heimamissiónin hevur bygt har.
- Hyggur ein eftir støðunum hjá Føroya Tele, so bar ein av hesum støðunum áður júst navnið Nesvík. Í dag er henda støðin løgd undir alt Norðstreymoyar økið.
- Hyggur ein kommunalt eftir økinum, so hoyrir tað í dag til ta stóru felagskommununa við heitinum Sunda kommuna, ið fevnir um bygdirnar heilt suður í Hósvík og norður til Gjáar. Har umsitingin av kommunalum viðurskiftum áður lá Streymoyar-megin, er hon nú flutt yvir um Sundið til Oyrarbakka.
- Hyggur ein sum veljari eftir økinum, so er bert ein veljari í Nesvík, hvørs valstaður er í Hvalvíkar skúla.

**– Tað eru kanska tey, ið undra seg yvir at nakar skal kunna búgva her í Nesvík. Men her er fínt at búgva, skal eg siga tær. Onkutíð er tað gott nokk eitt sindur einsligt, men ikki einsligari enn hjá so nógvum øðrum fólkum, sigur einasti íbúgvin í Nesvík, Árni Davidsen**

REPORTASJA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Norðaneftir fara bilarnir strúkandi framvið. Teir flestu eru júst farnir fram við brúnni um Streymin, og skunda sær móti málinum, sum hjá flestu teirra er høvuðsstaðurin.

Sunnaneftir fara bilarnir somuleiðis strúkandi framvið. Teir hava koyrt gjøgnum Kollafjørð, framvið Hósvík og eru nú komnir til Hvalvíkar. Teir fara framvið Streymnesi við tí í huganum, at eftir Streymnes er neyvan nakað hús við fólki í, fyrrenn ein kemur til húsini hjá løgtingsformanninum, Edmundi Joensen hinumegin brúnna á Oyrarbakka.

Allir hesir bilarnir fara strúkandi avstað, við eygunum festum á vegin og tað ið framman fyri er. Av hesi orsøk munnu neyvan mangir teirra gáa eftir teimum húsunum, sum liggja miðskeiðis millum Streymnes og brúnna. Høvdu teir bert skeitt eitt lítið vet oman móti fjøruni, høvdu teir uttan iva sæð hesi húsini. Tað er nevniliga ikki so, at øskukalt er allastaðni norðan fyri Streymnes. Her býr eisini fólk – fólk í eintali. Ein einasti maður.

Inni í einum húsum oman móti sjóvarmálanum býr nevniliga Árni Davidsen. Tað hevur hann gjørt síðani hann varð borin í heim fyri 66 árum síðani. Og tað ætlar hann framvegis at gera.

- Eg havi altíð búð her. Her er gott at búgva, so eg fari ongan veg, sigur ein blíður og siðiligur Árni, nú umboð fyri tíðindatænastuna eru komin á vitjan.

Einsemið nívir hann ikki, hóast hann bæði er einsamallur í húsi, einsamallur í bygdini og hevur langan veg til næsta granna og næstu bygd.

- Eg keði meg ikki eina løtu. Eg havi altíð okkurt at takast við. Og tá ein hevur bil, so er tað so nógv lættari at ferðast, sigur hann.

### Bygdamenning ella fráflyting

Eitt av orðunum, sum ofta verður havt á munni, tá ein tosar um føroyskan politikk er orðini "bygdamenning". Vit hava hoyrt hetta orðið so ofta, at tað rínir næstan ikki við longur.

Samstundis hoyra vit um livilíkindini hjá fólki í útjaðarinum og teir trupulleikar tey hava at dragast við í tí dagliga. Og vit hoyra alarmklokkurnar ringja úr útoyggjunum, har vandi er fyri øskukulda.

Tað eru ikki mong árini síðani teir báðir seinastu menninir fluttu úr Víkarbyrgi, soleiðis at henda bygdin í dag er útdeyð, hóast gott vegasamband er til bygdina. Spurningurin er tí kanska hjá mongum, hvør bygdin verður tann næsta, har seinasti íbúgvin sløkkir ljósið.

Í Nesvík situr Árni Davidsen og hevur hoyrt alt hetta tosið um útjaðara og bygdamenning. Men hann ætlar sær so ikki at flyta í nakað annað stað, hóast hann er einsamallur í bygdini.

- Eg havi altíð verið her, og eg havi ongar ætlanir um at flyta nakrastaðni, sigur hann.

Hann vil tó ikki verða umrøddur sum einabúgvi, tí hann hevur bil og dámar væl at vitja fólk og at fáa vitjan.

### Ikki einsligari enn hjá øðrum

Tað var í samband við seinasta fólkatingsval at okkum barst fyri oyra, at tað einans var ein veljari í Nesvík.



Vit vóru tá á reportasjuferð við valstaðið í Hvalvík og fingu tá at vita talið av veljarum til valstaðið. Og her var tann eini veljarin altso úr Nesvík.

Vit hitta Árna fyrrapartin ein hósdag í mars mánaði. Frá landsvegnum oman til húsini førir ein góður vegur okkum oman til tey brúnu husini, ið liggja ikki so langt frá sjóvarmálanum. Her býr Árni í barnaheimi sínum, og er fegin um tað.

Alt er ruddiligt og nossligt inni, og hann bjóðar okkum inn í køkin beinanvegin. Har stendur útvarpið frá, og tað ger kaffimaskinan eisini. Á køksborðinum stendur ein kaka, ið hann ætlar at bjóða gestunum úr Havnini.

- Tað eru kanska tey, ið undra seg yvir at nakar skal kunna búgva her. Men her er fínt at búgva, skal eg siga tær. Onkutíð er tað gott nokk eitt sindur



# Á sjógvi og landi

Árni varð borin í heim í 1939 í einum húsum hjá fastir sínari á Oyrarbakka. Men hesi 66 árini, sum liðin eru síðani tá, hevur hann búð í Nesvík.

Skúlabygningur var ikki í bygdini, men undirvíst varð í teimum svørtu húsunum, sum ein í dag sær sunnan fyri leguhúsið. Hann gekk eisini okkurt árið í skúla norðuri í Tjørnuvík, hagani foreldur hansara vóru flutt í tríati-árunum.

Hugurin var í fyrstu syftu til sjógvin, og fór hann til skips, áðrenn hann í 1960 fór á skiparaskúla í Havn. Hann var eftir hetta við Sundabúgvanum sum stýrimaður og var eisini eitt skifti við Kalsevni eftir sild í Norðsjónum.

Í 1965 legði Árni seg uppá land, og keypti sær lastbil. Hetta var um ta tíðina, tá menn vóru